## Ronaldinho 300 mió



Hóast Barcelona í kvøld stendur fyri helst størsta dystinum á árinum, so eru tað eisini onnur viðurskifti, sum hava rúgvað nógv seinastu tíðina. Eitt nú ljóðar fyri vist, at brasilski Ronaldinho er á veg úr felagnum, men Barcelona-forsetin, Joan Laporta, sigur, at hetta undir ongum umstøðum verður ókeypis. - Tað einasta, sum eg havi sagt, er, at Ronaldinho kostar 40 milliónir evrur (300 mió kr.). Og so fáa vit at síggja, um hann heldur fram í felagnum ella ikki, sigur Laporta við spanska miðlar.

## U17 landsliðið úttikið

Pætur Clementsen og Áki Johansen hava nú sett nøvn á spælararnar, sum skulu mynda U17 bruttohópin. U17 landsliðið skal spæla tvær altjóða kappingar í summar. KÍ og HB hava nógvar góðar dreingjaspælarar, tí 15 spælarar úr hesum feløgum hava fingið boð til bruttohópin. Úttiknu spælararnir til U17 bruttohópin eru: Teitur Gestsson, Ivan Joensen, Helgi Samson, Sørmundur A. Kalsø, Aksel Dalgaard, Johan Jacobsen, Heðin Klakstein KÍ, Kristian Joensen NSÍ, Dánjal P. Í Búðini, Hallur Hansson, Jógvan Skeel, Ludvík Súnason, Jónberg á Mýrini, Andras B. Vágsheyg, Páll Holm Jacobsen, Sørin N. Samuelsen HB, Sámal Weihe SKÁLA, Bárður Hansen VÍKINGUR, Bogi R. Petersen, Ari Ellingsgaard ÍF, Holgar Djurhuus, Røgvi E. Nielsen, Eli F. Nielsen 07 Vestur, Magnar Vang, Gilli Sørensen, Røgvi Joensen, VB/Sumba/TB, Hans H. Ejdesgaard EB/Streymur. Fyrsta venjingin hjá hópinum verður í Havn sunnudagin.

# Suðuroyggin vann mest

**SUM Smáunglinga-meistarastevnan í svimjing varð hildin í Vági fríggja- og leygardagin**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

**FAKTA**

| Felag | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| SuSvim | 13 | 9 | 8 |
| Reki | 8 | 5 | 2 |
| Ægir | 5 | 9 | 11 |
| HS | 5 | 1 | 4 |
| Flot | 3 | 5 | 1 |
| FS | 0 | 2 | 1 |
| Skeggjar | 0 | 0 | 2 |

Tað var stúgvandi fult av fólki í svimjihøllini í Vági fríggjadagin, tá SUM 2008 byrjaði. Byrjað var við skrúðgongu har allir luttakararnir við Merkinum á odda komu inn í høllina.

Síðani setti borgarstjórin í Vági Kirstin Strøm Beck megnar talu, har hon hugleiddi um svimjing fyrr og nú, og um tað, ið hesi ungu leggja í svimjingina. Hon men helt fyri, at tað var nokk mest tað, at hon dugdi at flóta, meðan framdriftin nokk ikki var so stór.



*Heimaliðið vann flestu heiðursmerkini, tá Smáunglingameistarastevna var í Vági fríggja- og leygardagin*

Síðani varð farið til kappingarnar, og her var tað heimaliðið, ið tók sær av flestu heiðursmerkjunum. Býtið av hesum var annars, sum víst á talvuni.




*Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg best í 4. umfari av Formula-deildini*

# Rijkaard vil leypa á

**Eftir keðiliga 0-0 javnleikin í tí, sum varð rópt fyri dreymadysturin, skulu Manchester United og Barcelona í kvøld finna útav, hvør teirra skal spæla Champions League finalu í Moskva**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri fótbóltsfjepparar kring alt Europa var talan um leikligt vónbrot, tá Barcelona og Manchester United dystaðust á Camp Nou í Barcelona seinasta mikukvøld.

Í kvøld er so seinna hálvfinalan á skránni, og hóast vónbrotið seinast, so er lítil ivi um, at vónirnar til eitt satt brak eru stórar.

Skal Barcelona vinna seg víðari, so er neyðugt at skora – um ikki annað í brotssparkskapping – men venjarin, Frank Rijkaard, ætlar tó ikki, at tað skal koma somikið langt.

- Móti Manchester United mugu vit spæla væl. Og tað nyttar okkum einki at spæla verjufótbólt. Vit noyðast fram at leggja trýst á teir, sigur Frank Rijkaard undan dystinum.

Hollendski venjarin sigur eisini, at tað væl kann vísa seg sum ein sera dýrur avbrennari, tá Ronaldo kiksaði brotsspark á Camp Nou mikukvøldið.

Seinastu dystirnir hevur Manchester United ikki spruttað heilt so nógv, og við bara fimm stigum í seinastu fýra dystunum eru fólk farin at tosa um kreppu, nú tað í mesta lagi eru fýra dystir eftir at spæla. Ein kreppa, sum kann bera við sær, at einki gull kemur til Old Trafford í ár.

Men slíkt tos vil Sir Alex Ferguson als ikki hoyra talan um. Til oddabrakið leygardagin valdi hann at hava Cristiano Ronaldo og Carlos Tevez á beinkinum. Og tað er ikki nakað, sum venjarin nú angar.

- Við somikið stórum dystum við somikið lítlum skotbráði var talan um eina lætta avgerð. Hetta felagið hevur uppiborið allar møguleikar í Europa, og tí varð avgerðin tikin.

- Og eg havi fult álit á mínum spælarum. Sjálvandi var vónbrotið stórt leygardagin, men vit noyðast at vinna dystin í kvøld, um vit skulu víðari, sigur Sir Alex Ferguson.

Við 11 heimasigrum á rað hevur Manchester United metið í europiskum høpi, og tað metið kann økjast, um talan aftur verður um sigur í kvøld.

## 774 runnu á flaggdegnum

Talan var um met, tá Bragdið skipaði fyri Flaggdagsrenning fríggjadagin.

Ikki færri enn 774 luttakarar høvdu boðað frá luttøku, og av hesum runnu ella gingu tey 591 allan tein.

Góða veðrið hevði helst sítt at siga, men ikki minst fegnaðust fyrireikararnir um, at fleiri stór virki høvdu eggjað sínum starvsfólkum til at taka lut í kappingini. Soleiðis vóru ikki færr enn 71 lið við í kappingini.

Fremstu rennararnir í kappingini vóru annars Guttormur Sørensen hjá monnum og Bjørk Herup Olsen hjá kvinnum.

**-mørk**

## Hálvt marathon leygardagin

Leygardagin klokkan 17 verður startskotið til FM-kappingina í hálvum marathon latið av. Teinurin, sum er 21,1 km langur, byrjar og endar á Bursatanga.

Umframt at talan er um FM-kapping, er talan eisini um opna kapping. Og tí kunnu øll tey, sum hava hug at royna seg, tekna seg til kappingina.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni, www.athletics.fo, og er evsta freist fyri hesum fríggjakvøldið.

**-mørk**

